SJÚKRAHÚS VERKIÐ

# Ársfrágreiðing 2023

*Eitt ár við spennandi frambrotum*



**Útgevari** Sjúkrahúsverkið
**Myndir** Klara Johannesen og Ólavur Fredriksen
**Uppseting** Nudlavirkið
**Prent** Føroyaprent

Svanamerktur prentlutur 541 705

# Innihaldsyvirlit

**Árið, ið fór** . . . . . . . . . . 4

**Visjón, missión og virðir** . . . . . . . . . . 7
Visjón . . . . . . . . . . 7
Missión . . . . . . . . . . 8
Virðir . . . . . . . . . . 8

**Eitt sameint sjúkrahúsverk á trimum matriklum** . . . . . . . . . . 10

**Politiskar raðfestingar í 2023** . . . . . . . . . . 11
Virkisøkir í Sjúkrahúsverkinum, ið fingu ítøkiliga játtan . . . . . . . . . . 11

**Virksemið í Sjúkrahúsverkinum** . . . . . . . . . . 12
11,4 mió. kr. í avlopi . . . . . . . . . . 13

**Strategi fram til 2025** . . . . . . . . . . 15
17 strategimál sett í verk . . . . . . . . . . 16

**Fyrstu deildirnar fluttar í H-bygningin** . . . . . . . . . . 19

# Árið, ið fór

Enn eitt ár er farið aftur um bak, og árið 2023 er eins serstakt og árini fyri. Arbeiðið við teimum strategisku málunum hjá Sjúkrahúsverkinum hevur sett sín dám á árið, og vit hava í alt megnað at avgreitt 17 av strategisku málunum. Sameiningin av Sjúkrahúsverkinum heldur sostatt fram, og vit eru í einum góðum stima. Merkisløtur, ið mynda rokkin mál, verða hátíðarhildnar fyri at gleðast um frambrotini. Vónin er, at vit eisini kunnu njóta tilgongdirnar fram ímóti málunum, og at vit eftir alt arbeiðið merkja munin.

***Sjúkrahúsverkið skal gerast universitetssjúkrahús, og um ársskiftið gjørdist Heilsugranskingareindin partur av verkinum.***

Ætlanin við Heilsugranskingareindini er, at savna heilsugransking á einum staði, fyri at fáa eitt granskingarumhvørvi, har heilsugranskarar hava møguleikan at deila vitan og royndir. Gransking vísir, at sjúkrahús, sum raðfesta at teirra starvsfólk fáa umstøður og tíð til gransking og undirvísing, hava eina betri sjúklingaviðgerð. Hetta fer at vera berandi fyri, at lyfta heilsugransking í Føroyum upp á eitt enn hægri støði.

Eisini varð Steno Miðstøð Føroya sett á stovn um ársskiftið. Endamálið við Steno Miðstøðini er, at styrkja viðgerð í diabetes og endokrinologiskum sjúkum og gransking innan hesi serøki. Nú Steno Miðstøðin hevur eitt ár á baki, er gransking longu komin á breddan, umframt at tey eru stigtakarar til at savna granskingarumhvørvið innan diabetes í Føroyum.

Tann 2. februar í 2023 gjørdist Klaksvíkar Sjúkrahús 125 ár. Hetta varð hátíðarhildið í Varpinum, sum er nýggja mentanarhúsið í Klaksvík.

***Á vári fekk Sjúkrahúsverkið í boði eina gávu frá vinnulívinum, um ein MR-skannara til Klaksvíkar Sjúkrahús.***

Sjúkrahúsverkið hevur fingið heimild frá Løgtinginum at taka ímóti gávuni. Klaksvíkar Sjúkrahús fekk eykajáttan til at fyrireika hølið til MR-skannaran, og arbeiðið við at seta skannaran í verk, umframt at upplæra starvsfólk til hetta, er farið í gongd.

Í 2023 vórðu ein nýggjur stjóri og ein nýggjur varastjóri settir í Sjúkrahúsverkinum. Gunnvá Guttesen tók við starvinum sum varastjóri á Landssjúkrahúsinum fyrst í juni.



Í november varð Hanus Toftheyggj settur sum stjóri í Sjúkrahúsverkinum og sum sjúkrahússtjóri á Suðuroyar Sjúkrahúsi, at byrja um ársskiftið.

Ein uppfylgjandi trivnaðarkanning varð gjørd í Sjúkrahúsverkinum í september, sum framhald av stóru trivnaðarkanningini í 2022. Kanningin vísti, at trivnaðarátøkini, sum eru gjørd, hava flutt okkum á røttu leið.

Verkfallið hjá Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar byrjaði fyrst í oktober. Avleiðingarnar av verkfallinum vóru minni manning enn vanligt og møði millum starvsfólkini, umframt longri bíðilistar og útsett virksemi. Seks vikur drúgva verkfallið endaði tann 15. november, tá semja varð funnin.

***Arbeiðið við H-bygninginum gongur framá, og í árinum sum fór, hevur nýggi bygningurin veruliga staðið sínar fyrstu royndir.***

Køkurin flutti inn í nýggja bygningin í august, og ferð kom síðani á innflytingarnar. Tíðliga á heysti hevði Hjartabólkurin hjá Endurvenjingini sínar fyrstu venjingar í nýggju hølunum í H-bygninginum, umframt at nýggja og framkomna seingjavaskið stóð sína royndarkoyring og flutti inn. Beint fyri jól fór H-bygningurin eisini at hýsa fyrstu sjúklingunum. Talan er um eina av skurðseingjadeildunum, ið er flutt úr elsta bygninginum á Landssjúkrahúsinum, í nýggjasta bygningin. Bæði starvsfólk og sjúklingar trívast væl í H-bygninginum, og arbeiðsumstøðurnar eru sera góðar.


SIEMENS
Healthineers

# Visjón, missión og virðir

## Visjón

Eitt sameint sjúkrahúsverk á altjóða stigi, eyðkent fyri nýhugsan.

- Trý sjúkrahús, sum samskifta, virka og skapa eftir somu virðum.
- Felags mentan og sami samleiki tvørtur um sjúkrahúsini.
- Virðing fyri sjúklingum, avvarðandi og starvsfólki, so at góð hugskot birtast og hava gróðrarlíkindi fyri víðari menning.
- Áhaldandi menning av starvsfólkum, stuðlað av nýggjastu tøkni.
- Rættstundis sjúkugreinan og viðgerð við skipaðum sjúklingagongdum.

**Visiónin** er tað langsiktaða málið, sum vit vilja røkka. Hagar kósin verður sett

**Strategiin** er leiðin og málini til hvussu vit flyta okkum fram móti visjónini

**Virðini** snúgva seg um ynskta atferð, er nakað sum vit hava við okkum og eru stuðlandi fyri atburðin hjá okkum

**Missiónin** er okkara kjarnuuppgáva. Tað, sum vit gera og okkara tilverurættur. Fundamentið undir øllum



# Missión

### Dygdargóð heilsutænasta alt lívið

- Sjúkrahúsverkið veitir heilsutænastur, ið fevna frá gitnaði til seinastu fráferð.
- Málið er dygdargóðar heilsutænastur, bornar av vitan og tænastusinni.

### Vitan

- Faklig vitan, førleikar og menning.
- Tøkni í breiðastu merking.
- Mentan, sum er opin og fevnandi.

### Tænastusinni

- Uppliving av at vera í miðdeplinum.
- Uppliving av góðari tænastu.
- Uppliving av nærlagni.

# Virðir

### Stev

At hava felags stev gevur styrki, sýnir samanhald og vekir álit. Fyri at halda felags stev, mugu vit arbeiða tvørtur um mørk, deildir og fakøki. Vit eru øll javnlík, tá uppgávur skulu loysast – og fyri at koma á mál, krevur tað bæði samskipan, samskifti og eina neyva kós. Rúm skal vera fyri øllum, og vit skulu duga at gagnnýta styrkirnar hjá tí einstaka. Øll skulu kenna seg vird, og øll skulu kunna siga sína hugsan.

### Í atburði merkir hetta

- at tú í talu og verki sýnir sjúklingum og starvsfeløgum virðing.
- at tú setur teg inn í støðuna hjá tí, tú samstarvar við.
- at tú raðfestir felags mál hægri enn egin mál.
- at tú vísir toymisanda millum deildir, deplar og sjúkrahús.

### Áræði

At hava áræði gevur drívmegi og skapar framburð. Fyri okkum er umráðandi at vera ágrýtin, sýna jaligan hugburð og vilja royna nýggjar leiðir. Vit skulu veita høga dygd og skjótleika.

### Í atburði merkir hetta

- at tú birtir vón og vísir á gongdar leiðir.
- at tú ert áhaldandi og vísir nærlagni.
- at tú eggjar til loysnir.
- at tú tekur ábyrgd, tá avgerðir skulu takast.

### Flog

At hava flog merkir, at vit kunnu vera skapandi, hugsa víðskygt og navigera í broytingum, samstundis sum vit loysa okkara uppgávur. Flog er eitt fjøltáttað hugtak, sum krevur, at vit brúka okkara hugflog, eru forvitin, koma við góðum hugskotum, mennast og skapa yvirlit. Fyri at halda flognum krevst framfýsni. Til tess krevst føði – vitan og menning.

### Í atburði merkir hetta

- at tú setur høg mál og torir at bróta upp úr nýggjum.
- at tú býður vanahugsan av.
- at tú ert búgvin at taka ímóti broytingum.
- at tú støðugt víðkar sjónarringin.


WARNING
PHILIPS
Patientliste
Undersøgelse
Visning
H

# Eitt sameint sjúkrahúsverk á trimum matriklum

Sjúkrahúsverkið fevnir um trý sjúkrahús, sum landafrøðiliga eru spjadd runt í landinum. Søguliga hava sjúkrahúsini verið tríggjar sjálvstøðugar eindir, sum leiðslan fyri Sjúkrahúsverkið síðan 2018 hevur arbeitt við at sameina til eina samanhangandi eind.

Leiðslan fyri Sjúkrahúsverkið er samansett av einum forstjóra, Steinari Eirikstoft, sum eisini er sjúkrahússtjóri á Landssjúkrahúsinum og tveimum stjórum, Alexandaru á Dul og Hanusi Toftheyggj, sum eisini eru sjúkrahússtjórar á ávikavist Klaksvíkar Sjúkrahúsi og Suðuroyar Sjúkrahúsi. Harumframt eru fýra varastjórar; Tummas í Garði, sum er varastjóri við læknafakligari bakgrund fyri alt Sjúkrahúsverkið, og tríggir varastjórar við sjúkrarøktarfrøðiligari bakgrund: Gunnbjørg Guttesen á Suðuroyar Sjúkrahúsi, Súsanna Olsen á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og Gunnvá Guttesen á Landssjúkrahúsinum.

**Í Sjúkrahúsverkinum eru 1022 ársverk innan áleið 30 ymiskar fakbólkar.**



# Politiskar raðfestingar í 2023

## Virkisøkir í Sjúkrahúsverkinum, ið fingu ítøkiliga játtan

**1.950 tús. kr. vórðu játtaðar til bráðfeingis hjálp til sálarligar trupulleikar**

Arbeiðsbólkur arbeiðir við hesum, og er tørvur á nógvum sjúkrarøktarfrøðingum at loysa uppgávuna. Størvini eru lýst leys og tilboðið verður í fyrsta umfari opið um kvøldarnar.

**1.360 tús. kr. vórðu játtaðar til dialysusatelitt á Suðuroyar sjúkrahúsi og dialysukoyring**

Sjúkrarøktarfrøðingar vórðu settir 1. november, og dialysusatelitturin varð tikin í brúk 4. mars 2024. Játtanin varð brúkt til løn fyri november–desember, umframt útreiðslur í sambandi við upplæring. Sjúkraflutningstænastan skipar fyri flutningi av dialysusjúklingum í Suðuroy.

**1.400 tús. kr. vórðu játtaðar til at seta tveir demenssamskiparar afturat**

1. august varð ein landsdemenssamskipari settur í Tórshavn á brøk 1,0. 1. september varð ein landsdemenssamskipari settur í Tórshavn á brøk 0,5. 1. oktober varð ein landsdemenssamskipari settur í Suðuroy á brøk 0,7.

**100 tús. kr. vórðu játtaðar til at barnakonur ikki skulu gjalda fyri innivist og vistarhald**

Hetta er íverksett, og barnakonur og teirra avvarðandi rinda ikki fyri innivist og vistarhald, tá tey búgva í íbúðarblokkunum hjá Landssjúkrahúsinum.

**1.400 tús. kr. til krabbameinsátøk**

Lýsing hevur verið úti eftir palliatiónslækna. Vit hava fingið tilsøgn um at palliatiónslæknar eru settir í parttíðarstarv á brøk 0,8, so partar av játtanini er sett í verk.

Tveir arbeiðsbólkar eru settir viðvíkjandi tarmscreening og ávísingar- og útgreiningareind.

# Virksemið í Sjúkrahúsverkinum

Tølini niðanfyri vísa eitt úrval av teimum viðgerðum, sum hava verið í Sjúkrahúsverkinum í 2023.

**11.658**
Innleggingar

**140.388**
Ambulantar vitjanir

**1.731**
Sjúklingar sendir uttanlands

**34.485**
Gistingar á Sjúklingahotellinum Tórshavn

**3.638**
Skurðviðgerðir

**453**
Dagskurð

**565**
Børn fødd

**5.757**
Sjúkraflutningar

**13.416**
Skaðastovu-viðgerðir

**1.644.819**
Rannsóknarstovu-kanningar

**50.027**
Røntgenkanningar

**3.623**
MR-skanningar

**9.997**
CT-skanningar

**2.082**
Blóðgávur latnar blóðbankanum

**1.022**
Starvsfólk ársverk

**4,7**
Miðal innleggingartíð (dagar)

## 11,4 mió. kr. í avlopi

Játtanin hjá Sjúkrahúsverkinum var í 2023 yvir 1 mia. kr., og samanlagt var úrslitið eitt avlop á 11,4 mió. kr. Tað var serliga kontan til viðgerð uttanlands, sum hevði stórt avlop, hóast met-nógvir sjúklingar vórðu sendir uttanlands til viðgerð. Harumframt var verkfallið hjá Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar í oktober–november orsøk til eina minninýtslu.

| í 1000 kr. | Játtan 2023 | Roknskapur 2023 | Avlop/Hall 2023 |
|---|---|---|---|
| **Úrslit Klaksvíkar Sjúkrahús** | **99.805** | **99.470** | **335** |
| *Klaksvíkar Sjúkrahús* | *99.805* | *99.470* | *335* |
| **Úrslit Suðuroyar Sjúkrahús** | **87.125** | **87.426** | **-301** |
| *Suðuroyar Sjúkrahús* | *87.125* | *87.426* | *-301* |
| **Úrslit Landssjúkrahúsið** | **696.673** | **695.292** | **1.381** |
| *Landssjúkrahúsið* | *696.673* | *695.457* | *1.216* |
| *Landssjúkrahúsið, inntøkufíggjað virksemi, vaskarí* | - | *-165* | *165* |
| **Úrslit Serviðgerð uttanlands** | **177.684** | **168.329** | **9.355** |
| *Serviðgerð uttanlands* | *148.955* | *141.340* | *7.615* |
| *Serviðgerð uttanlands, flutningur* | *28.729* | *26.988* | *1.741* |
| **Úrslit Sjúklingahotellið Tórshavn** | **25.345** | **25.657** | **-312** |
| *Serviðgerð uttanlands, Sjúklingahotellið Tórshavn* | *25.345* | *25.657* | *-312* |
| **Úrslit KT-øki heilsuverksins** | **10.091** | **9.119** | **972** |
| *KT-øki heilsuverksins* | *10.091* | *9.119* | *972* |
| **Úrslit fyri Sjúkrahúsverkið** | **1.096.723** | **1.085.293** | **11.430** |



# Strategi fram til 2025

Leiðslan í Sjúkrahúsverkinum hevur ment eina strategi fyri Sjúkrahúsverkið fram til 2025. Ásett eru 43 strategimál, sum hava til endamáls at sameina og samskipa Sjúkrahúsverkið. Higartil eru 17 av strategimálunum avrikað, 15 strategimál eru sett í gongd, og 11 verða fyrireikað og koma á skrá í næstum.

Á myndini niðanfyri eru tey 43 strategisku málini skipað í fimm yvirskipaðar bólkar; okkara samleiki, viðgerð við høgari dygd og sjúklingatrygd, starvsfólkamenning og trivnaður, KT, medico og heilsuskipanir, umframt strategisk menning. Hvørt tal sipar til eitt strategiskt mál. Nøkur strategisk mál eru longu avrikað. Tey síggjast við grønum liti. Málini, sum eru í gongd, hava gulan lit, og tey, ið enn verða fyrireikað, eru reyð á myndini. Málini, ið hava myrkan og gráligan lit eru endurskoðaði og løgd undir annað mál.



## 17 strategimál sett í verk

Tey strategisku málini, sum eru avgreidd, eru hesi:

**1. Felags virðisgrundarlag**
Verksetingin av felags virðisgrundarlagi fyri Sjúkrahúsverkið byrjaði á heysti 2021. Endamálið við at seta virðini í verk er, at vit fáa eina felags mentan, sum kann flyta okkum fram móti visjónini um eitt sameint Sjúkrahúsverk.

**2. Felags intranet**
Nýggja intranetið, Stimin, er sett í verk í desember 2023. Við Stimanum hava vit eitt felags innanhýsis amboð í Sjúkrahúsverkinum til kunning og samskifti.

**5. Felags innleiðsla**
Leisturin fyri felags innleiðslu var liðugur í 2022 og er verksettur. Innleiðslan er skipað á sama hátt á øllum trimum sjúkrahúsunum við virðisgrundarlagnum sum grundarsteini.

**8. Urologi felags visitatión**
Felags visitatión innan urologi er sett í verk, soleiðis at sjúklingar við urologiskum sjúkum bert verða visiteraðir til eitt sjúkrahús. Hetta er ein týðandi liður í at samskipa eina góða tænastu og stytta um bíðilistan.

**11. Tvørfaklig og tvørgangandi rehabilitering í Sjúkrahúsverkinum**
Ein tvørgangandi eind er sett í verk í Sjúkrahúsverkinum fyri at menna fleiri tilboð innan rehabilitering og samskipa hesi betur millum sjúkrahúsini við tvørgangandi funktiónum.

**12. Neurorehabilitering**
Endamálið var at gera eitt greitt býti av fasunum 1 og 2 innan apoplexi, umframt at tryggja væl skipaðar sjúklingagongdir og mannagongdir. Tilmælið er handað, og arbeiðið við verksetanini er byrjað.

**13. Parkinson rehabilitering**
Tilboð um parkinsonrehabilitering er ment og sett í verk á Suðuroyar Sjúkrahúsi í samstarvi við Landssjúkrahúsið. Endamálið er at hjálpa sjúklingum við Parkinson til eitt sjálvstøðugt lív og at betra um lívsgóðskuna.

**14. Demensvinarligt samfelag**
Sjúkrahúsverkið eigur ein leiklut í, at landið gerst demensvinarligt. Demensklinikkin á Psykiatriska deplinum samskipar arbeiði við landsdemenssamskiparanum og umsitur ein vitanardepil fyri demens, sum eisini umfatar fyriskipan av undirvísing og upplæring av demens til allar geirar.

**21. Trivnaðarkanning og sálarligt arbeiðsumhvørvi**
Fyrsta trivnaðarkanningin í Sjúkrahúsverkinum varð gjørd á heysti 2022. Trivnaðarkanning er eitt strategiskt amboð til at varðveita og styrkja Sjúkrahúsverkið sum eitt attraktivt arbeiðspláss, har trivnaður er í hásæti.

**24. Leiðsla og leiðslumenning**
Undirvísing og leiðslumenning byrjaði í september 2023 og fer at halda fram í 2024. Eitt av endamálunum fyri leiðslumenningini í Sjúkrahúsverkinum er, at vit hava eitt felags leiðslukodeks.

**26. Heilsunet í øllum Sjúkrahúsverkinum**
Tøkniliga leggur hetta lunnar undir størri samstarv, tá ið nýggjar KT-loysnir skulu finnast, sum kunnu virka tvørtur um sjúkrahúsini. Hetta er ein fortreyt fyri effektivum og smidligum samstarvi í Sjúkrahúsverkinum.

**29. Uppstiging COSMIC 8.1**
Dagføringin av Cosmic var avgerandi fyri, at klinikarar kundu halda fram við at brúka skipanina, og hevur við sær eitt nýtt medisinmodul, sum tryggjar samstarvið við eldraøkið, Gigni og Apoteksverkið.




### 34. Heildarætlan og støðulýsing av øllum bygningum hjá Sjúkrahúsverkinum

Landsverk hevur í samstarvi við Sjúkrahúsverkið gjørt eina fakliga meting av, hvørjum standi bygningarnir hjá Sjúkrahúsverkinum eru í. Ein heildarætlan er gjørd, sum ger tað møguligt at skipa og raðfesta viðlíkahaldið av bygninunum á skilabesta hátt.

### 36. H-bygningurin tikin í nýtslu

Innflytingin í H-bygningin er byrjað stigvíst. Í 2023 eru køkurin, endurvenjingin, seingjarvaskið og skurð seingjadeild flutt inn. Umorganisering, nýggj útgerð og tøkni geva møguleika fyri enn betri sjúklingagongdum og samstarvi um og við sjúklingin.

### 41. Familjudepilin

Familjudepilin varð settur á stovn í 2021. Endamálið við Familjudeplinum er at stuðla undir alla tilgongdina hjá barnafamiljum, børnum og ungum, frá gitnaði til barnið er 18 ár. Allar barnakonur, børn og ung fáa á hendan hátt viðgerð á sama depli.

### 42. Steno Diabetes Center Færøerne

Steno Miðstøðin varð formliga skipað 1. januar 2023. Endamálið við Steno Miðstøðini er at fyribyrgja diabetes og komplikatiónir, og økja um lívsgóðskuna og lívslongdina hjá øllum við diabetes og øðrum endokrinologiskum sjúkum í Føroyum.

### 43. Raðfesta tilmælini í nýggjari Krabbameinsætlan

Skjót og góð krabbameinsviðgerð er avgerandi fyri møguleikarnar hjá tí rakta at koma fyri seg. Sjúkrahúsverkið hevur arbeitt við tilmælunum í samstarvi við Heilsumálaráðið. Samanumtikið hevur dentur verið lagdur á økini: Palliatión, screeningseind, ávísingar- og útgreiningarskipan, og tarmscreening.



# Fyrstu deildirnar fluttar í H-bygningin

Árið 2023 var merkt av innflyting í H-bygningin, og í august flutti køkurin inn. Starvsfólkini í køkinum vóru tey allarfyrstu, ið funnu seg til rættis í H-bygninginum. Nýggi køkurin er útgjørdur við nútímans útgerð og burðardyggum loysnum, og tað gevur heilt aðrar møguleikar í matgerðini og tænastuni til sjúklingarnar. Køkurin hevur, umframt hetta, slóðbrótandi samstarv við Tórshavnar Kommunu og biogassverkið Førka, ið ger matleivdir um til el, hita og tøð.

Í september hevði Endurvenjingin á Landssjúkrahúsinum sína fyrstu venjing við hjartabólkinum í nýggju venjingarhølinum í H-bygninginum. Hølini í teimum eldru sjúkrahúsbygningunum hava tænt væl, og fara í eina tíð framvegis at húsa endurvenjingini. Starvsfólk og leiðsla arbeiða við at skipa flytingina væl, so sjúklingarnir kunnu kenna seg tryggar við tær broytingar, sum fara fram.

Nýggja framkomna seingjavaskið í H-bygninginum hevur staðið sína royndarkoyring og er flutt inn. Seingjavaskið er eitt frambrot, og tað er ein tøkni, ið ger arbeiðsumstøðurnar hjá starvsfólkunum munandi betri.

***H-bygningurin fór í desember mánað eisini at hýsa sínum allarfyrstu sjúklingum. Talan er um eina av skurðseingjadeildunum, ið er flutt úr elsta bygninginum á Landssjúkrahúsinum, A-bygninginum, í tann nýggjasta bygningin.***

Tað er nógv tekniskt og praktiskt, ið skal tryggjast, tá sjúklingar flyta inn í eina seingjadeild. Hetta er tí ein týdningarmikil hending, ið er og fer at vera ein av merkisløtunum í hesari verkætlanini.

Í 2024 verður arbeitt fram ímóti, at restin av bygninginum verður tikin í nýtslu.

SJÚKRAHÚS
VERKIÐ